Summar PRÁT

# Vit eiga at byggja brýr heldur enn múrar



- VANTANDI STÝRING HEVUR VIÐ SÆR, AT **ROKNINGIN** VERÐUR SEND **VINNULÍVINUM** OG **SKATTABORGARUNUM**. HER MÁ BROYTING KOMA Í. OKKARA **POLITIKARAR** MUGU VÍSA EVNIR OG VILJA AT **BYGGJA BRÝR** FYRI LAND OG FÓLK HELDUR ENN AT **BYGGJA MÚRAR**, SIGUR **JÓHANNA Á BERGI,** STJÓRI Á FAROE SHIP. HON HELDUR TAÐ VERA UMRÁÐANDI AT LEIÐA BÆÐI VIÐ **HØVDINUM, HJARTANUM OG HONDUNUM**. SUM **KVINNA** HEVUR HON ONGANTÍÐ KENT SEG **SKERDA** Í VINNULÍVINUM, OG TÍ HELDUR HON IKKI **KYNSSPURNINGIN** VERA SERLIGA **ÁHUGAVERDAN**



**SUMMARPRÁT**
Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Hon er 39 ára gomul, hevur verið stjóri á Faroe Ship í fýra ár og hevur búð bæði í Havn, Klaksvík og uttanlands. Allastaðni hevur hon trivist, og starvið sum stjóri í Faroe Ship dámar henni sera væl. Jóhanna á Bergi er ein teimum ikki alt ov mongu kvinnunum, ið hava komið sær upp á ovastu rok í vinnulívinum, og sum hvønn dag skal taka truplar avgerðir í eini vinnu, har nærum bara menn hava arbeitt. Hetta er als ongin trupulleiki, heldur hon. Samstarv er lykilin til at eydnast, eisini tvørtur um kynini, og størstu uppgávu sína heldur hon vera at skapa úrslit og fáa starvsfólkini at síggja møguleikar í øllum, tey fáast við.

### Hvussu umfatandi er uppgávan sum stjóri í Faroe Ship?

Eg byrjaði í Faroe Ship í 2006. Ein av fyrstu uppgávunum hjá okkum var at skipa eitt leiðslutoymi, sum skuldi standa á odda fyri at leggja virksemið hjá Skipafelagnum, Eimskip, Hera Thomsen og Farmaleiðum saman í eina eind. Hetta er eindin, sum vit í dag marknaðarføra undir navninum Faroe Ship, ið Eimskip eigur 100 prosent av. Vit hava verið gjøgnun nógvar broytingar síðstu árini. Eru farin frá at vera umleið 200 til 100 fólk, hava selt 5 skip, Lóm, Blik, Skuran, Sirius og Nordland, umlagt farmasiglingina frá plattaskipum til bingjuskip og fingið nýggja siglingarætlan, har vit eru partur av siglingarkervinum hjá Eimskip, sum røkkur um allan heim. Fimm komur og fráferðir eru í Føroyum um vikuna. Innanlands hava vit eisini umlagt og niðurlagt deildir og ment eitt koyrikervi við 25 bilum.

### Hvussu hevur gingist hjá felagnum seinastu árini?

Úrslitið er nøktandi, og tað hevur gingið sum ætlað at skipa arbeiðið soleiðis, at vit í dag kunnu veita eina góða tænastu á okkara øki. Vit eru heildarveitari av flutningstænastum. Hvørja viku er flutningur millum Føroyar og Århus, Rotterdam, Immingham, Fredrikstad, Helsingborg og Reykjavík og haðani víðari til Amerka, Afrika og Fjareystur. Vit hava eisini goymsluvirksemi, standa fyri lossing og landing, koyra við vørum, skipa fyri skundflutningi gjøgnum Faroe Express og umboða skip.

### Tú ert ovasti leiðari hjá nógvum fólkum. Hvussu er tað?

Tað er spennandi og avbjóðandi. Eg elski starvið og trívist so ótrúliga væl og havi gjørt tað frá fyrsta degi. Hjá Faroe Ship arbeiða sera nógv ymisk fólk, ið hava ymiskar arbeiðsuppgávur, sum allar skulu ganga upp í eina hægri eind. Vit arbeiða øll fram ímóti sama máli. Við ársenda leggja vit eina ætlan, sum vit arbeiða eftir komandi árið, tó at vit støðugt laga okkum til tær avbjóðingar, sum taka seg upp so hvørt, og tær eru mangar.

### Hvat heldur tú er góð leiðsla?

Tað er at leiða við høvdinum, við hjartanum og við hondunum og støðugt klára at menna og motivera fólk. Hetta er tað, sum vanliga verður rópt management, leadership og so at seta ætlanir í verk. Góð leiðsla er at tillaga og skifta ímillum hesar leiðsluhættirnar eftir tørvi. Hvussu tú fert fram, veldst um, hvørjar persónar og uppgávur talan er um. Í vinnulívinum skalt tú sjálvandi vísa á úrslit, tí annars stendur fyritøkan seg ikki. Mangan hugsi eg um orðatakið, sum sigur, at tað, sum tú leggur eftir teg, er tað, sum hevur eydnast, og ikki tað, tú komst til. At vera stjóri hevur ikki so nógv at siga fyri meg. Tað snýr seg meira um, hvat liggur eftir, tá eg fari, bæði tá tað snýr seg um úrslit og hugsunarháttin hjá starvsfólkunum, ið vónandi síggja lívið sum eina gávu og síggja meining og møguleikar í øllum, tey fáast við. Tað snýr seg í stuttum um tað, sum verður ment og bygt upp.

### Hvussu taklar tú mótgongd í arbeiðslívinum?

Eg hugsi ikki um ein trupulleika sum mótgongd, men sum eina avbjóðing. Tað ljóðar kanska sum, at alt er so lætt, men so er ikki. Vit eru seks fólk í